

## Umhugsa limaskap

Sunda kommuna er limur í Føroya Kommunufelag, men herfyri fekk kommunan fyrispurning frá Kommunusamskipan Føroya, um hon vil verða limur har ístaðin fyri. Bygdaráðið hevur ikki tikið støðu enn. Heðin Zachariassen, borgarstjóri, sigur, at tað eru fyrimunir og vansar við at skifta felag. Í FK kunnu bygdaráðslimir vera stýrislimir, men í KSF manna borgarstjórarnir stýrið. Sjálvur heldur hann tað fyrra vera tað betra.

## Mótmæla hvalaveiði

Nýsælendingar eru alt annað enn fegnir um, at íslendingar hava gjørt av at fara undir vinnuliga stórhvalaveiði aftur. Chris Carter, ráðharri í umhvørvisvernd, segði í gjár, at nýsælendska stjórnin fer at senda íslendsku stjórnini eitt mótmæli, og at hon fer at vísa á, at fleiri hvalasløg eru í vanda fyri at verða týnd. Umhvørvisfelagsskapir í Ný Sælandi mótmæla eisini íslendsku avgerðini og siga, at einki rímiligt grundarlag er undir henni.

# Lobbyvirksemið longu byrjað

**Bæði Finnur Helmsdal og Jenis av Rana viðurkenna, at málið um samkynd er viðkvæmt og hevur stóran áhuga eisini uttanfyri tinggátt. Løgtingsfólk fáa bæði teldubrøv og sms frá fólki, ið antin eru fyri ella ímóti. Í samkomum verður biðið**

SAMKYND
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Viðkvæma málið um at geva samkynd innivist í revsilógini tykist hava stóran áhuga millum fólk. Uppskotið, sum Finnur Helmsdal og Annita á Fríðriksmørk hava lagt fram, býtir løgtingið í tvey. Í teimum fýra størstu flokkunum eru partafólk ósamd, og samgongan tykist ikki finna nakra semju. Avgerðin tykist í veruleikanum liggja hjá nøkrum fáum tingmonnum, ið ikki hava tikið endaliga støðu enn, og hetta hevur økt um trýstið uttanfyri tinggátt.

Sum skilst hava løgtingsfólk fingið óvanliga nógv teldubrøv og sms frá fólki, ið heita á tey um antin at atkvøða fyri ella ímóti. Eisini felagsskapir, so sum Føroyadeildin hjá Amnesty International, royna at gera sína ávirkan galdandi.

### Biðja í samkomum

Í gjár kom so ein beinleiðis áheitan frá øðrum uppskotsstillaranum, Finni Helmsdal, um at fáa fólk og felagsskapir at gera sína ávirkan galdandi, so uppskotið verður samtykt.

Jenis av Rana er ímóti uppskotinum. Hann sigur seg vita um fleiri samkomur, har biðið verður fyri, at løgtingsmenn fylgja Guðs orði og atkvøða ímóti.

- Tú kanst ikki kalla hetta lobbyvirksemi. Virksemið liggur á einum hægri stað, og eg seti mítt álit á, at løgtingsmenn taka atlit til, hvat Bíblian sigur og atkvøða ímóti. Persónliga havi eg einki ímóti, at fólk uttanífrá gera sína ávirkan galdandi, so uppskotið verður vrakað, sigur Jenis av Rana.



*- Tú kanst ikki kalla hetta lobbyvirksemi. Virksemið liggur á einum hægri stað, og eg seti mítt álit á, at løgtingsmenn taka atlit til, hvat Bíblian sigur og atkvøða ímóti, sigur Jenis av Rana, ið sipar til, at biðið verður í samkomum um, at uppskotið um at broyta revsilógina verður vrakað*

### Finst at fjølmiðlunum

Jenis av Rana heldur annars, at málið um samkynd er blást upp og vrangsnúgvað í fjølmiðlunum. Í eini greinarøð í Sosialinum skýrir miðflokkatingmaðurin millum annað summi fjølmiðlafólk fyri at misnýta sína position á tann hátt, at tað eru tey kristnu, ið verða stemplað sum tey, ið ganga á odda í at happa og forfylgja øðrvísi hugsandi.

"Hví misnýta nøkur fjølmiðlafólk sína position á hendan hátt? Hví eru tey so óreell?", spyr Jenis av Rana millum annað í greinarøðini.

# Málið um samkynd: Tey sjey blivu tvey

**Ætlanin var, at sjey av átta tingfólkum hjá Tjóðveldisflokkinum skuldu standa sum avsendarar av uppskotinum um broyting í revsilógini, men semja fekst ikki í lag, tí Páll á Reynatúgvu ikki vildi vera við**



*- Eg havi ongantíð sagt, at eg havi broytt støðu. Seinast atkvøddi eg ímóti, og tað standi eg framvegis við, men latið okkum nú síggja, sigur Páll á Reynatúgvu, ið ikki vildi vera millum uppskotsstillararnar um at broyta revsilógina*

SAMKYND
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Tað eydnaðist ikki Finni Helmsdal og Annitu á Fríðriksmørk at fáa semju innanfloks. Ætlanin var, at ein samdur tingbólkur undantikið Karsten Hansen skuldi standa sum avsendari av uppskotinum um at skoyta "kynsliga orientering" upp í mannamunsgreinina í revsilógini.

Men tað eydnaðist ikki at fáa semju, tí Páll á Reynatúgvu, sum atkvøddu ímóti upskotinum á jólum, ikki vildi vera við. Av tí sama varð semja í tingbólkinum um bert at hava Finnur Helmsdal og Annitu á Fríðriksmør sum uppskotsstillarar.

### Vil ikki siga

Tað hevði annars ljóðað bæði millum tingfólk í Tjóðveldisflokkinum og í fjølmiðlunum, at sandoyartingmaðurin hevði broytt støðu, men hesum vil hann ikki kennast við.

- Eg havi ongantíð sagt, at eg havi broytt støðu. Seinast atkvøddi eg ímóti, og tað standi eg framvegis við, men latið okkum nú síggja. Uppskotið er ikki viðgjørt enn, og tí kann eg ikki siga, hvør mín endaliga avgerð verður, sigur Páll á Reynatúgvu, ið ásannar, at hansara atkvøða kann gerast tann avgerandi, um uppskotið verður viðtikið ella fellur.